# Vita um partarnir hava flutt seg

*Í gjár klokkan 13 fór Føroya Lærarafelag á fund við semingsmenninar. Undan fundinum segði semingsmaðurin Allan Skaalum, at talan var um at vita, um partarnir høvdu flutt seg. Hann segði seg vóna, at partarnir hava flutt seg, so vón er fyri semju*



DAGFINN OLSEN

Eftir at samband var millum Føroya Lærarafelag og semingsmenninar í síðstu viku, vóru í gjár aftur tikin stig til at finna semju millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Klokkan 13 í gjár hittust semingsmenninir og Lærarafelagið.

Semingsmaðurin Allan Skaalum segði undan fundinum í gjár, at fyrst ætlaðu semingsmenninir at hitta felagið og møguliga kundi so verða talan um fund við Fíggjarmálastýrið seinni.

Hann segði seg vóna, at partarnir hava flutt seg, so vón er fyri semju.

– Um partarnir standa í sama stað, so er eingin meining í at gera nakað. Fundurin nú er fyri at vita, um partarnir hava flutt seg, segði Allan Skaalum í gjár.

– Talan er fyrst og fremst um at gera eina staðfesting av, hvar partarnir standa og vita um nakað er at gera, segði Allan Skaalum.

Semingsmenninir Allan Skaalum og Rúni Heinesen hava áður gjørt royndir at finna semju, uttan at tað hevur eydnast. Arbeiðssteðgurin hjá sáttmálasettu lærarunum hevur nú brátt vart í 5 vikur. Seinastu tíðina hevur eisini verið skipað fyri tiltøkum og aftur í gjáramorgunin vóru blokadur við skúlar kring landið.

Allan Skaalum staðfesti avgjørdur undan fundinum í gjár, at høvdu partarnir ikki flutt seg, so var ikki nógv at gera.

Lærarafelagið hevur áður víst á, at tað vil koma á tal við landsstýrismannin við skúlamálum.

Allan Skaalum sigur, at eingin ivi er um, at samráðingarmótparturin hjá Lærarafelagnum er Fíggjarmálastýrið.

*Semingsmaðurin Allan Skaalum vónaði undan fundinum við Føroya Lærarafelag í gjár, at partarnir hava flutt seg, tí annars er ikki vón um semju*

## Yvirlýsing

**Undirritaðu kvinnufeløg í Føroyum vilja við hesum siga frá, at vit fult og heilt taka undir við krøvum Føroya Lærarafelags mótvegis landsstýrinum og heita tí á avvarðandi myndugleikar, um at skipa so fyri, at lærarar og næmingar sum skjótast sleppa aftur í skúla.**

**Samstundis átala vit, at politikarar seta í verk lógir, sum teir siga seg ikki hava ráð at gjalda fyri, tí tað er av sonnum at undirmeta bæði tingarbeiðið og alt Føroya fólk.**

**Vágs Matmøðrafelag Klaksvíkar Húsmøðrafelag, Vága Húsmøðrafelag, Kongshavnar Kvinnufelag, Tofta Kvinnufelag, Skála Húsmøðrafelag**

## Royna at fáa glið á

*Elsa Birgitta Petersen, Føroya Lærarafelag, segði undan fundinum við semingsmenninar í gjár, at talan er um eina roynd at fáa glið á aftur samráðingarnar*

DAGFINN OLSEN



Hóast tað var eitt sindur avmarkað, hvussu nógv semingsmenn og forkvinnan í Føroya Lærarafelag vildu siga undan fundinum teirra millum í gjár, so er greitt, at fundurin er komin í lag, eftir at samband var millum semingsmenninar og Lærarafelagið alla síðstu viku.

– Talan er um eina roynd at fáa glið á aftur samráðingarnar, segði Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, í gjár.

**Einki um flyting**
Semingsmaðurin Allan Skaalum staðfesti, at semingsmenninir ætlaðu at vita, um partarnir hava flutt seg, síðani teir síðst royndu semju.

Elsa Birgitta Petersen vildi ikki gera viðmerkingar til, hvørt Føroya Lærarafelag hevur flutt seg, ella ikki.

Hon segði undan fundinum, at tað fekst at vita, eftir at fundurin hevði verið.

## Mong mótmælisskriv

Skúlanevndirnar í Eysturoynni hava sent skriv til Føroya Løgting, har skúlanevndirnar siga seg taka undir við skrivinum frá »Formansskapinum fyri skúlanevndirnar fyri framhaldsdeildirnar í Føroyum«. Í hesum skrivinum frá 8. apríl sigur formansskapurin seg vilja hava tingið uppí ósemjuna millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Foreldur at børnum í skúlanum í Leirvík hava sent skúlanevndini á staðnum skriv. Har biða tey skúlanevndina heita á uppíblandaðu partarnar um at taka upp aftur samráðingarnar.

Foreldrini í Leirvík eru ótrygg, nú børnini ikki hava fingið lógarkravdu undirvísingina í meira enn 4 vikur.



*Tilvildarlig mynd*





TRYGDARSKEIÐ
-ið snýr seg um tína trygd á arbeiðsplássinum

*"Ein sera stuttligur háttur at gerast gløggari"*

- **Hvørjir vandar eru við nýtslu av gassum?**
- **Hvørji trygdar- og arbeiðsumhvørvistiltøk eiga at verða framd?**

Føroya Gassøla heldur í viku 19 eina røð av trygdarskeiðum í sambandi við nýtslu av gassi. Hesi skeið verða skipaði av trygdarábyrgdarum frá AGA, ið hava nógvar royndir innan hald av trygdarskeiðum í Danmark, t.d. fyri sløkkilið og Falck, tekniskar skúlar og ídnaðin á øllum stigum. Skeiðini venda sær til øll, ið hava áhuga fyri trygdini hjá virkinum og sær sjálvum. Umframt hetta snýr skeiðið seg eisini um eginleikarnar við gassi og hevur í sær nógvar praktiskar royndir. Tú hevur møguleika at verða við í fylgjandi skeiðum, sum hvør sær varar 3-4 tímar:

| | | |
|---|---|---|
| **Mánadagin** | **8. mai** | **Sørvágur** |
| **Týsdagin** | **9. mai** | **Klaksvík** |
| **Mikudagin** | **10. mai** | **Tórshavn** |
| **Hósdagin** | **11. mai** | **Øravík** |

**Ynskjast fleiri upplýsingar set teg í sambandi við:**

Føroya Gassøla
Akranesgøta 2
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 55 44
Fax 31 17 06

Ring og tekna teg ella starvsfólk tíni á tel. 31 55 44 ella 21 25 44.
Kostnaðurin er kr. 195,- fyri fólkið íroknað breyð og kaffi.

AGA SETUR TRYGDINA Í HÁSÆTI AGA

Sosialurin - 311820




# Jákup Sverri Kass: Løgtingið má nú enda læraraverkfallið við lóg

*Líkt er nú til, at kinkur er komin í hjá samgonguni í málinum um verkfallið hjá lærarunum. Tá ið Løgtingið hevur fund í dag, fer Jákup Sverri Kass at royna at fáa 16 tinglimir við sær at leggja uppskot fyri tingið um at enda verkfallið við lóg.*

ÁKI BERTHOLDSEN


*Landsstýrissamgongan er ikki samd um, hvat skal gerast við verkfallið hjá lærarunum. Løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og aðrir limir í samgonguni hava sagt kortanei til at løgtingið skal blanda seg uppí verkfallið. Men í dag fer ein tinglimur úr samgonguni kortini at kanna møguleikarnar fyri at fáa málið reist í tinginum og hann er ikki einsamallur sum hevur hug til tað. Mynd: Jens Kr. Vang*

Roynt verður nú at fáa ósemjuna ímillum lærarafelagið og fíggjarmálastýrið fyri í Løtinginum.

Tað er Jákup Sverri Kass, tinglimur fyri sjálvstýrisflokkin, sum fer at royna at fáa tingið at taka málið upp.

Sostatt tykist tað sum um kinkur er komin í hjá samgonguni í málinum um verkfallið hjá lærarunum.

Tí higartil hevur samgongan avgjørd víst øllum møguleikum frá sær at leggja seg út í málið politisk.

Sum tað skilst á greinini á síðu 10, sær Jógvan á Lakjuni, tingmaður fyri fólkaflokkin ongan annan møguleika enn at tingið leggur uppí, um ikki viðurskiftini fáast í rættlag beinanvegin.

Og nú ger eisini ein annar samgongutingmaður, Jákup Sverri Kass úr sjálvstýrisflokkinum, greitt, at eisini hann hevur fingið nokk av tí vanlukkuligu støðu, sum børn og foreldur eru komin í av verkfallinum, sum hann málber seg.

Og hann ætlar sær ikki at góðtaka støðuna longur, sama hvat tey, sum hava politiska ábyrgd av málinum siga.

– Hetta málið snýr seg hvørki um Løgmann, Lærarafelagið, Karsten Hansen, Høgna Hoydal, ella aðrar politikarar.

– Hetta snýr seg heilt einfalt bara um børnini, sum ikki fáa undirvísing, skúlan sum liggur í skeljasori og um foreldrini, sum ikki trygg kunnu lata børn síni fara í skúla, tí tey ganga fyri vág og vind ein stóran part degnum, tí skúlagongdin er so tilvildarlig.

Hann sigur, at nú tingið hevur fund í dag fer hann tí at kanna møguleikarnar fyri at leggja uppskot fyri tingið um at enda verkfallið við lóg.

Fyri at kunna leggja uppskot fyri tingið nú, krevst at minst 17 tinglimir skriva undir at leggja tað fram.

Og nú fer Jákup Sverri Kass at royna at fáa 16 tinglimir at leggja uppskotið fyri tingið saman við sær.

Og hann ætlar bæði at seta seg í samband við tinglimir úr samgonguni og úr andstøðuni, sigur hann.

– Eydnast tað at fáa eitt uppskot fyri tingið, verður tað eisini neyðugt hjá tinginum at víkja frá tíðarfreistunum fyri viðgerðini, so at tað verður avgreitt skjótt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag aftur sum skjótast.

**Taka undir við honum**
Jákup Sverri Kass sigur, at nú tingfundir verða alla vikuna er tað eitt frálíkt høvi til at tinglimir stinga høvdini saman at vita, hvat kann gerast.

Hann sigur at hann hevur spurt seg fyri hjá foreldrafeløgum tey taka fult undir við, at tingið leggur uppí og fær viðurskiftini í rættlag.

– Fæst meiriluti fyri politiskari uppílegging, er tann stóri spurningurin, hvussu hetta skal gerast.

– Onkur hevur nevnt møguleikan at lata lærararnar fáa 6,5% í lønarhækking, sum øll hini hava fingið, men so at lata tey samráðast við landsstýrismannin í undirvísingar -og mentamálum um sjálva fólkaskúlalógina.

Men tað heldur sjálvstýrismaðurin er skeivt. Hann sigur, at fyri sær er málið púra greitt:

– Løgtingið hevur samtykt eina lóg og so má løgtingið eisini taka avleiðingarnar av henni og játta teir neyðugu pengarnar.

Jákup Sverri Kass sigur, at hetta er Strandferðslan og Postverkið umaftur

Teimum stovnunum setti løgtingið ávís krøv, men vil ikki betala, hvat tað kostaði, og avleiðingin var, at báðir stovnarnir komu í óføri.

– Tí eiga vit at hoyra allar partar í málinum, bæði lærarafelagið, foreldrini og ikki minst, semingsmenninir.

– Ein møguleiki kundi verið at gjørt tað seinasta semingsuppskotið til lóg, sigur Jákup Sverri Kass.

Annars eru nógvar áskoðanir í samgonguni um, hvussu farast skal fram, so tað fær hann ikki sagt so nógv um.

Tó hevur hann avgjørt varhugan av, at fleiri tingmenn eru sinnaðir at leggja uppí, tí hetta kann ikki halda fram leingi afturat.

– Landsstýrið hevur boðað frá, at tað tekur ongi politiskt stig fyri at loysa málið.

– Tí má onkur annar gera tað, tí hetta kann ikki halda fram, sigur Jákup Sverri Kass.

## Skulu ikki bíða eftir tinginum

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum á tingi, Heini O. Heinesen, heldur ikki, at tað er rætt at koyra málið í tingið.

Hann heldur, at hetta er eitt mál, sum eigur at verða loyst við samráðingum.

Hann sigur, at hvørki samgonguleiðarin, Løgmaður, ella landsstýrismenninir, sum vara av málinum eru sinnaðir at leggja málið fyri tingið.

– Tí loysir tað seg ikki at seta seg upp afturá at dúva uppá at løgtingið at skal greiða fløkjuna.

– Tað nyttar ikki at renna undan veruleikanum, men fyrsta treytin er, at partarnir fáast til samráðingarborðið, sigur Heini O. Heinsen.

Men hann leggur afturat, at tað er ivingarsamt um eitt fakfelag kann leggja seg út í, hvussu nógv skal setast á á fíggjarlógini.

– Partarnir eru samdir um lønina, og tað plagar at vera tað ringasta. So tá ið semja er um tað, mátti borið til at funnið útav, hvussu skjótt fólkaskúlalógin skal setast í verk, sigur Heini O. Heinesen. *–Áki–*


HUGNAKVØLD
-serliga ætlað eldri fólki
Hóskvøldið 13/4

Til Matna
❊ Fesk súpan
❊ Lambasteik
❊ Kaffi/te og íslagkøka

JANUS PETERSEN sigur frá,
EIVØR PÁLSDÓTTIR syngur
og eisini verður felagssangur og klavertónleikur

Øll eru vælkomin, bæði bólkar og einstaklingar


Janus Petersen


Eivør Pálsdóttir

Kostnaður fyri tiltakið kr. 150,-

Tilmelding á tel. 31 75 00

Altíð vælkomin á
Eisini fæst bílig gisting
Hotel Föroyar
Tel. 317500
Best Western

Sosialurin - 311820